

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 09 - 2012

# Heimsins størsta á veg til Angola

Heimsins størsta rørleggingarskip, tað norska "Seven Borealis", er nú á veg til Angola, har tað skal arbeiða fyri franska oljufelagið Total SA. Skipið, sum er 182 metrar langt og 46,2 metrar breitt, hevur krana til at lyfta 5.000 tons og kann leggja rørleiðingar av øllum sløgum á djúpum eins væl og grunnum vatni. Umborð er pláss fyri 400 fólkum. Kostnaðurin at byggja skipið var um tríggjar milliardir krónur. Arbeiðsuppgávan, sum "Seven Borealis" skal gera á Clove-leiðini úti fyri Angola, er tann fyrsta hjá skipinum. Enn hevur skipið ikki fingið nakað arbeiði á norskum øki, men Stuart Fitzgerald hjá reiðarínum Subsea 7, sigur við Aftenbladet, at útlit eru fyri nógvum virksemi í norskum øki í komandi árum, so framtíðarvánirnar eru góðar.